# Ov tíðliga at meta um nakað enn



Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, heldur, at tað er nakað tíðliga at siga nakað um fíggjarkreppuna í sambandi við forsetavalið

**Enn er ov tíðliga at meta um, hvørt valið av Obama sum forseta loysir upp fyri altjóða fíggjarkreppuni, heldur landsbankastjórin**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

So er amerikanska forsetavalið av, og landið fær á fyrsta sinni ein littan forseta, Barrack Obama. Men hvussu stórur munurin verður í politikkinum hjá Obama mótvegis sitandi George W. Bush, er kanska eitt sindur verri at siga.

- Tað ber illa til at siga nakað um tað enn. McCain ætlaði at halda fram við skattalættum eins og Bushstjórnin hevur gjørt, meðan Obama hevur ætlanir um at nýta meira almennan pening, sigur Sigurd Poulsen, landsbankastjóri.

Hann heldur, at fíggjarmarknaðurin fyri ein part hevur innroknað væntaða forsetaskiftið, og tí verður broytingin frá Bush til Obama neyvan kollveltandi.

- Ein partur er innroknaður, tí marknaðurin hevur lagað seg til sannlíka vinnaran, sigur Sigurd Poulsen.

Hann heldur, at vit kunnu bara bíða og síggja, hvørji tiltøk komandi forsetin fer at seta í verk.

- Vit vita heldur ikki hvussu langt kreppan er komin, og hvussu leingi hon fer at vara. Hartil kemur, at USA er so mikið skuldarbundið, at tað fer at seta avmarkingar, sigur Sigurd Poulsen.

### Lítil munur

Landsbankastjórin heldur, at munurin í veruleikanum ikki var so stórur millum partarnar, og at uttanríkispolitikkurin hjá báðum forsetavalevnunum, meiri ella minni var hin sami.

- Sjálvt í irakpolitikkinum hevur George Bush lagt somu kós, sum Obama hevur, seinasta árið, sigur Sigurd Poulsen.

Í fíggjarpolitikkinum er kanska eitt sindur størri munur, men fíggjarkreppan setur avmarkingar, sjálvt um báðir høvdu sínar ætlanir um, hvussu teir kundu loysa hana.

- Tað veldst eisini um, hvør semja fæst í Senatinum og í Umboðsmannaráðnum, sigur Sigurd Poulsen.

Hann hevur onga greiða meining um, hvussu leingi hendan fíggjarkreppan fer at vara, men nevnir tó, at teir flestu serfrøðingar, sum hava úttalað seg, meta, at hon verður ikki av fyrr enn í 2010.

# Obama verður eins og Bush

**Danskir serfrøðingar ávar ímóti at geva valinum av Obama ov stóran týdning. Á fleiri økjum verður han eins og Bush, sláa teir fast**

FORSETAVAL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað gekk soleiðis, sum ein stórur meiriluti av dønum – og kanska føroyingum við – ynsktu, tá Barrak Obama tíðliga í morgun hevði vunnið amerikanska forsetavalið. Men tveir av leiðandi donsku serfrøðingunum í amerikanskum politikki og samfelagi, ávara nú danir um, at forsetatíðin hjá Obama ikki neyðturviliga verður ein góð uppliving fyri danir.

- Eg vænti, at tað fer at taka fleiri á bóli, at Obama fer at føra sama uttanríkispolitikk, sum Bush. Hann er á mangar mátar bundin á hendur og føtur. Tað er framvegis kríggj í Afganistan og Irak, og tað er framvegis fíggjarkreppa, so tað eru ikki mangir pengar til taks, sigur Mads Fuglede, høvundur og lærari á Grundtvigs Højskole, við ekstrabladet. dk.

Hann heldur, at danir hava sannført seg sjálvar um, at tað nú verður ein sosialdemokratur við bleytum virðum, sum setur seg í ovala rúmið í Hvítu Húsunum.

- Hann hevur als ongar ætlanir um at gera USA til eitt kopi av Norðurlondum. Hann fer ikki at avtaka deyðarevsing, og hann fer ikki at avtaka vápnalógina, sigur Mads Fuglede.



*Mads Fuglede er serfrøðingur í amerikanskum politikki og samfelagi. Hann sigur, at Obama á mongum økjum fer at føra sama politikk sum Bush*

### Religiøsur forseti

Eisini David Nye, professari við Syddansk Universitet, center for Amerikanske Studier, undirstrikar, at á nøkrum økjum verður førdur sami politikkur sum undir Bush, og kanska fara danir at uppliva ein forseta, sum teir hava verri við at skilja.

- Hann er religiøsur, eins og Bush. Á mangar mátar hevur religiónin ikki ávirkað politikkin hjá Bush. Tað fara vit at uppliva við Obama. Tá hann tosar um vælferð, so vil hann fíggja hana gjøgnum kirkjurnar, og tað fara danir kanska at hava ilt við at skilja, sigur David Nye.

Valið av Obama fær eisini týdning fyri almenna Danmark í viðurskiftunum við USA. - Tað tætta sambandið millum Bush og Fogh hevur givið Danmark eina rødd, sum vit ikki kunnu rokna við frameftir, sigur Mads Fuglede.

- Teir báðir hava eitt tætt og gott samband, ein vinskap sum hevur tryggjað okkum, at vit koma ígjøgnum við okkara meiningum, sjálvt um vit ikki altíð verða hoyrd. Vit missa nakað av tí nú. Vit skulu byrja av nýggjum, men vit hava hópin av goodwill at arbeiða víðari við, sigur hann.

Men Fuglede undirmetir ikki, at valið av Obama hevur givið vónina aftur til amerikanararnar og allan heimin.

- Tað kann hava stóran týdning. Fólk sum Reagan og Schlüter kundu eisini fáa veruleikan av síggja minni hóttandi út, sigur Mads Fuglede við ekstrabladet.dk



*Enn valdar stór óvissa um, hvussu valið av Barrack Obama fer at ávirka amerikanskan politikk*